
TALV

John Rødgaard skrivar:

8-landa-kappingin, 4

Steintór hevði eitt sera áhugavert talv í dystinum Føroyar/Danmark móti Fedder. Soleiðis sá út eftir 16 leikir:



Steintór sat mest sum og bíðaði eftir, at svartur skuldi bjóða javnt. Og tað hevði helst gingið, um hann hevði leikað 17. Rde4 og havt rókarnar á opnu e-linjuni. Men tá tað sær út til at standa væl til, kann vera trupult at telva neyvt, og so kann ganga sum her (hava vit ikki øll roynt tað?):

17. Bg4?!f5
18. Bf3 Rhe8
19. Rd2?

19. Rd3 ella 19. h4.

19. - Bc4!
20. Rxe8 Rxe8
21. b3 Bf7
22. Re2 Re5!
23. c4 g5
24. g4 Ke6
25. Kd2 Bg6
26. b4?

26. c3!


26. - Rxe2†
27. Bxe2 fxg4
28. Bxg4† Ke5

og svartur vann. Ikki skal meira til, at tað verður galin endi!


5. umfar, Føroyar — Vesturtýskland: 0—6

John — Hertneck, IM	0—1
Jens Chr. — Grün, IM	0—1
John — Eng, IM	0—1
Steintór — Heinbuch	0—1
Pia — Feustel, IM	0—1
Bogi — Wahls	0—1

Hesum høvdu vit ikki roknað við! Hvussu kundi tað ganga so galið? Jú, Jens Chr. kom longu illa fyri í byrjanini. John J., Steintór og Pia komu illa fyri í endatalvi. Men Bogi og eg skuldu ikki havt tapt.



Henda støðan var komin eftir at týskarin hevði leikað 34. c3 og bjóðað javnt! Bogi svaraði 34. -, f4† 35. Kg4, e3 og tapti. Meg minnist ikki, hvat hann ikki hevði sætt. Hjá mær sjálvum gekst líka illa.



Eg roknaði eitt korter fyri at vissa mær, at talvið var javnt eftir: 57. Kg2, Ba5, 58. Bc1, Bc3 59. Ba3, Be5 60. Kf2, Bd6 61. Kg2, Ka5 62. Kf2, c4 63. Bxd6, cx3 64. Ba3, Ka4 65. Bb2, Kb4 66. d4, a5 67. Kg3, a4 68. d5, Kc5 69. Kxg4, Kxd5 70. Kf3, Kc4 71. Ke2, Kb4 72. Kd2, a3 73. Kc1. Síðan kannaði eg í 5 minuttir, at kongurin stóð líka væl á e3 og leikaði 57. Ke3??? Mótstøðumaður mín hugdi bilsin at mær og gjørdi skjótt av 57. -, Ba5 58. Bc1, Bb6! Á, sum eg kendi meg býttan, tá ið eg gavst!!

6. umfar, Noreg — Føroyar: 4½—1½

Agdestein—John	½—½
Østenstad,FM—J. Chr.	1—0
Elseth—John	1—0
Hoen,FM—Steintór	½—½
Dahl—Pia	½—½
Ludvigsen—Bogi	1—0

Steintór og Pia tóku skjótt javnt. Sjálvur tók eg ikki av tilboði um javnt, men tá so mótstøðumaður mín gjørdi nakrar rimmarleikir, sissaðist eg. Jens Chr. telvaði væl og var greitt




betur fyri. Men í tíðarneyð setti hann sína bestu finnu í deyða. John telvaði í eini tveimum førum ikki nóg neyvt, og tað var nóg mikið til, at Elseth gjøgnumførdi eitt positionelt væl leikað talv.

Bogi kom illa frá byrjan. Í tíðarneyð eydnaðist honum kortini at fara í mótatsókn, men eftir herviliga villu mátti eisini hann lúta.

7. umfar, Føroyar — Svøriki ½—5½

John—Karlsson,GM	0—1
J.Chr.—Schüssler,IM	0—1
John—Wiedenkeller,IM	0—1
Steintór—Renman,IM	0—1
Pia—Borisova	½—½
Bogi—Hellers,IM	0—1

Karlsson spældi eitt sera gott talv. Hann læt eina finnu fyri at fáa í lag álop, og eftir at eg hevði gjørt ein feil, fór tað sum ein skeribrennari gjøgnum eitt kavahús! Jens Chr. royndi seg í einum sera fløktum talvi, har alt fór í sor, júst tá líkt var til, at tað fór at eydnast honum at sleppa heilskapaður burturúr. John legði harðliga fyri kongamegin, men alt í einum kom mótálopið á miðborði við ógvisligari megi. Steintór læt ein mann fyri tvær finnur, men hann fekk ikki nóg mikið spæl fyri hann. Vit søgdu Piu 16 teir fyrstu leikirnar hjá Borisovu, so tá hon skuldi hugsa sjálv, hevði hon næstan støðu at vinna!



Svartur leikaði 17. -, e4. Men virðingin mundi vera í meira lagi, tí hon tók av tilboðnum um javnleik í eini støðu, har tað hevði verið eitt knoss, men kortini møguligt, at vunnið. Bogi fløkti seg inn í eitt harðligt frábrigdi, sum Hellers, ið annars 16 (!) ára gamal hevur ein stórmeistaranorm, var serkønur í.

Og úrskurðurin av øllum hesum? Ja, at vit øll uttan Steintór fingu minni burtur úr enn væntað. (At Steintór við 1 1/2 stigi av 7 fekk meira enn ætlað, sigur ikki sørt um, hvussu stinna mótstøðu vit høvdu). Men aloftast er tað so. Tá hin parturin altið er betri, gongur tað út yvir konserntratiónina. Tað munnu vit øll vita um. So tað er eingin grund til at fella í fátt. Ið hvussu so er, hugsi eg, at vit øll, ið vóru við, hildu ferðina vera góða og ikki minst lærurika.

Til síðst takki eg hinum.

STAR SHIPPING
TLF. 1 4980 TELEX 81215
TELEFAX 15926



FLYTIÐ FARM TYKKARA
VIÐ FØROYSKT BYGDUM SERSKIPUM
BYGD TIL FØROYSKAN TØRV

VIT FERMA TIL FØROYA

HVØRJA VIKU		AÐRU HVØRJA VIKU	
MIDDELFART	MIKUDAG	GRIMSBY	DRAMMEN
KØBENHAVN	HØSDAG	VLISSINGEN	TRONDHEIM
AALBORG	FRIGGJADAG	HALMSTAD	AALESUND

AVGREIÐSLUR

KØBENHAVN
E.A.Bendix & Co. A/S
Adelgade 17
1304 København K
Phone: 01 113343
Telex: 15643

HALMSTAD
Wilson & co. AB
Strandgatan 6a
S-30104 Halmstad
Phone: 035-118135
Telex: 38070

AALESUND
Mørestrøms A/S
N-6001 Ålesund - Norge
Phone: 071 22313
Telex: 42738

AALBORG
E.A.Bendix & Co. A/S
Slotsgade 36
9100 Aalborg
Phone: 08 138300
Telex: 69643


VLISSINGEN - HÅLAND
Aug. de Meyer bv
Engelandseweg Vlissingen Oost
Postbus 11
4380 AA Vlissingen Holland
Phone: 011 18e1 86130
Telex: 37826

TRONDHEIM
J.P.Bruun & Co. A/S
Havnegt. 2
N-7001 Trondheim - Norge
Phone: 07 524660
Telex: 55078

MIDDELFART
E.A.Bendix & Co. A/S
Havnen
5500 Middelfart
Phone:
Phone: 09-416300
Telex: 58240

DRAMMEN
Sverre Nielsen Ltd. A/S
Arbogagata 6
N-3001 Drammen - Norge
Phone: 03 818180
Telex: 18772

GRIMSBY
Selvic Shipping Services Ltd
Immingham Docks
South Humberside DN40 2LZ
Grimsby
Phone: 0469 76225
Telex: 52508



STAR SHIPPING
AARVEGUR 11
3800 TÓRSHAVN

ATAK
eitt gott tak
pf VESTMANNA TIMBURHANDIL
3860 Vestmanna . Telefon 24170

BERGMENN
spæla allan tónleik til dans fyri rímiligan penga.
Tlf. 16134

BRÚKTUR BILUR ER EITT ÁLITISMÁL



VIT HAVA GÓÐAR BRÚKTAR BILAR Á GOYMSLU
SÁMULIGIR PRÍSIR — LAGALIG FÍGGING
NISSAN pf AUTO Service